# Avhildin leiðari

**Mikudagin var móttøka á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í samband við, at Tordur Niclasen hevði starvast har í 20 ár. Nógv vóru tey, ið nýttu høvið at støkka inn á gólvið at bera honum heilsu á stóra degnum**

STARVSDAGUR
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað var týðiligt, at tað vóru ikki "pliktrøður", ið hildnar vórðu fyri Tordi Niclasen á 20 ára starvsdegnum mikudagin. Røðurnar komu frá hjartanum, og tað skiltist, at hann er væl umtóktur leiðari.

Bæði starvsfólk, búfólk og onnur nýttu høvið at bera honum heilsu á stóra degnum.

Um Tordur hevur hildið, at rósandi orðini vóru nakað nógv av tí góða, er ilt at siga, men tá hann, sum seinastur fekk orðið, fortaldi hann hesa fittu søgu:

Ein morgunin, tá hann kom til arbeiðis, kom eitt av starvsfólkunum koyrandi við einum av búfólkunum. Tordur heilsaði og spurdi: "Hvat siga leirvíkingar í morgun?"

Við sínum mildu eygum hugdi konan uppá hann og svaraði: "Tú ert fittur!".

"Hatta var vakurt sagt", hoyrdi Tordur starvsfólkið siga við konuna, tá tær fóru víðari.

"Okkurt skal man siga", læt tá í hesi gomlu.

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim er kent fyri at vera ein serstakliga hugnaligur bústovnur, har trivnaðurin verður settur høgt. Hesum gav Tordur starvsfólki sínum æruna fyri.

Hann segði, at hóast leiðarin er stavnamaður, so er tað manningini fyri at takka, at trivnaðurin er í hásæti.

- Trivnaður er ikki ein knøttur, tú kanst trýsta á - trivnaður er nakað, tú skapar, segði hann.

Tað var stúgvandi fult av fólki á røktarheiminum henda dagin. Millum mongu gávurnar og blómurnar, fekk Tordur frá stýrinum fyri heimið ein málning av heimbygd síni, Sørvági.

Eftir tónleik og røður varð borðreitt við pinnamati og køkum.



*Tað var ikki frítt, at Tordur Niclasen varð rørdur av øllum rósandi orðunum, hann fekk á 20 ára starvsdegnum.*
*Her er hann avmyndaður saman við stýrisformanninum, Sæunn Ó. Hansen*



*Tað var ringt at finna eitt stað at seta bilin uttan fyri Eysturoyar Røktar-og Ellisheim mikudagin. Veðrið var gott; merkið veitraði í fullari stong, og inni á heiminum var stúgvandi fult av fólki komið at heiðra Tordi Niclasen á 20 ára starvsdegnum*












# Skotska innrásin heldur fram

VITJAN
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Í nakrar dagar hevur skotsk vika verið í Havn og aðrastaðni við, har ymisk tiltøk hava verið á skránni. Mikukvøldið varð hugnakvøld á Plattformi við skotskum dansi, sangi og søgum. Eisini var høvi hjá fólki týsdagin og mikudagin at royna tjóðardrykk skota, whisky. Tað var í Müllers pakkhúsi. Annars hevur vikan verið hildin á torginum í SMS umframt at tað hava verið konsertir. Mikukvøldið spældu ungdómar, sum fáa sær útbúgving á tónlistaskúlanum í Aberdeen, í Norðurlandahúsinum. Eisini Vertshúsið hevur verið karmur um skotsku dagarnar.



*Skotskur tónleikur í Müllers pakkhúsi*

*Mynd Jan Müller*



*Borgarstjórin í Havn, Jan Christinasen roynir eitt av teimum mongu skotsku whiskysløgunum, her í Müllers pakkhúsi*

*Mynd Jan Müller*

### Skotskur matur og skotskur tónleikur

Í sambandi við skotsku vikuna verður skotskur matur at fáa og skotskur tónleikur at hoyra í Havn í vikuskiftinum.

Kokkurin Ian Simpson, tónleikabólkurin Banish misfortune og plátuvendarin DJ David Craig vitja.

Skotski kokkurin Ian Simpson vitjar Merlot fríggjakvøldið og leygarkvøldið og borðreiðir við skotskum mati.

<u>Banish Misfortune spæla á hesum støðum:</u>
í SMS fríggjadagin kl. 17.00 og leygardagin kl. 13.00
í miðbýnum fríggjadagin kl. 15.30 og leygardagin kl.11.00
í Vertshúsinum fríggjakvøldið kl. 22.00, leygarkvøldið kl. 22.00 og sunnukvøldið kl. 21.00
Diskotek við DJ David Craig verður í Platform fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Hósdagin hittust umboð fyri myndugleikar í Havn og Aberdeen at viðgera mál av felags áhuga. Eitt nú var fundur í grunninum, sum letur stuðul til ymisk endamál. Borgarstjórin í Aberdeen fór heimaftur hóskvøldið.




